# Alarar ótolnast eftir loyvinum at koppseta

**Nógv eftirspurda koppingarevnið móti ILA-sjúkuni er komið til Føroyar og er klárt at taka í nýtslu. Men enn liggur tað á goymslu, tí bíðað verður eftir einari kunngerð um loyvi at koppseta**

ALING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Smoltalarar vita ikki síni lívandi ráð, tí júst hetta koppingarevnið skuldi vónandi loysa trupulleikan við herviligu ILA-sjúkuni.

Men teir sleppa ikki at brúka hetta koppingarevnið, tí enn finst eingin kunngerð frá landsstýrinum sum gevur teimum loyvi at brúka hetta evnið.

Trupulleikin er tann, at smoltið jú veksur alla tíðina og gerst sjóbúgvið. Hetta er tí ein sera óheppin støða fyri smoltalarar, og sum dagarnir ganga gerst støðan bara verri og verri.

- Jú, hetta er ein sera álvarsom støða fyri okkum. Hendir ikki okkurt rættiliga skjótt, so koma vit at hava eitt fíggjarligt tap av hesum, sigur Atli Gregersen, alari úr Gøtu.

Vinnumálaráðið hevur ábyrgdina av, at ein kunngerð verður gjørd og sett í gildi. Men henda er ikki komin enn, hóast Bjarni Djurholm í seinastu viku segði, at hon skuldi vera liðug hesa vikuna.

Undan evstamarki okkara í gjár fingu vit tíverri hvørki fatur á Bjarna Djurholm ella øðrum fólki í Vinnumálaráðnum, sum kundu siga okkum, nær kunngerðin varð liðug.

## Kann taka tíð

Atli Gregersen sigur, at hann og hinir alararnir vóru sera fegnir, tá koppingarevnið umsíðir kom til landið fyri 3-4 vikum síðani.

Teir hava síðani tá bara bíðað eftir, at ein kunngerð um loyvi at brúka hetta evnið skuldi koma, men hon er so ikki komin enn.

Alt er kortini ikki leyst og liðugt, tá sjálv kunngerðin kemur. Tí sum skilst, skulu alararnir senda inn eina umsókn um loyvi at koppseta fyrst. Og tað kann eisini taka tíð at fáa eina slíka avgreidda hjá myndugleikunum.

- Tað er ikki soleiðis, at fáa vit t.d. kunngerðina týsdagin so kunnu vit longu byrja at koppseta mikudagin.

- Og tí er tað sera óheppið, at vit ikki sleppa í gongd sum skjótast. Tí vit hava veruliga skund við at fáa hetta gjørt, sigur Atli Gregersen.

## Tvørt fyri

Koppsetingin hevur serligan skund, tí at tað koppsetta smoltið má hava eina ávísa tíð við evninum í sær, áðrenn tað kann sleppast út.

Henda prosessin kann taka einar tveir mánaðir, og tá er ein longu komin út í hálvan mai mánað. Tá skal smoltið helst verða sett út, áðrenn summarhitin kemur í áirnar.

Verður tað so, at verkfall somuleiðis verður í mai mánað, so kann støðan gerast sera trupul – fyri ikki at siga katastrofal – hjá mongum alarum. Og tá kann ein næstan byrja at tosa um at várútsetingin øll er farin fyri skeyti.

- Tað er sera harmiligt, at vit sum hava stríðst fyri at bjarga alivinnuni, nú skulu bíða eftir eini einstakari kunngerð. Hetta kemur ótrúliga tvørt fyri, sigur Atli Gregersen.

Hann hevur tó longu sent inn eina umsókn um loyvi at koppseta, og ætlar sær tí beinanvegin í gongd, so skjótt kunngerðin og loyvið eru klár.

# Útlát av veðurlagsgassi - dagførd uppgerð

**Í 2002 varð føroyska útlátið av veðurlagsgassi fyri tíðarskeiðið 1990-2001 gjørt upp. Nú er henda uppgerð dagførd, og vísa tølini, at útlátið av veðurlagsgassi í koltvíiltueindum hevur verið støðugt síðani 2001. Útlátið í 2003 er sostatt enn 11% hægri enn í 1990**

ÚTLÁT
*Heilsufrøðiliga Starvsstovan*
*Umhvørvisdeildin*

Føroya Løgting hevur í 1993 samtykt ST-veðurlagssáttmálan, og er tað tí av týdningi, at eisini Føroyar samhaldsfast átaka sær sín part av arbeiðinum við at steðga veðurlagsbroytingum. Heilsufrøðiliga starvsstovan vil mæla til, at roynt verður at minka um útleiðingina av veðurlagsgassi. Hetta merkir, at nýtslan av fossilum brennievnum eigur at tálmast. Størsta avbjóðingin vil verða at minka $CO_2$ útlátið frá fiskiskipum, sum standa fyri 33% av CO2 útlátinum. Harafturat er útlátsminking frá stórum keldum, sosum húsarhaldum (17%), orkuframleiðslu (16%), ídnaði (12%), og akførum (11%) sera týðandi.

Í februar 2005 fekk Kyoto-protokollin frá 1997, sum er partur av veðurlagssáttmálanum, lógfrøðiligt gildi, eftir at 141 lond høvdu staðfest avtaluna. Kyoto-protokollin snýr seg um ítøkiliga áseting av, hvussu nógv tey einstøku londini vilja tálma útlátið av veðurlagsgassi. Í Kyoto-protokollini hava ídnaðarlondini bundið seg til ein felags niðurskurð uppá gott 5%, men samstundis er ymiskt, hvussu niðurskurðurin er býttur millum londini. ES skal t.d. minka útlátið við í miðal 8%. Danmark hevur átikið sær at minka útlátið við 21%.

Føroyar eru á orkuøkinum í mangar mátar ólíkar Danmark og ES-londunum. Føroyski búskapurin er sera heftur at fiskivinnu, sum er ein orkukrevjandi vinna, har tað er torført at finna alternativ til olju. Hetta kundi talað fyri einum lægri niðurskurði, og við eini møguligari oljuvinnu í huga, kundi tað verið tørvur á at fingið viðurkent eina serskipan. Ísland og Noreg kunnu t.d. hava ávikavist 10% og 1% vøkstur í útlátinum.

Útroknaðu útlátini fyri 2002 og 2003 vísa, at samlaða útlátið av veðurlagsgassi í koltvíiltueindum hevur verið støðugt síðani 2001. Útlátið í 2003 er sostatt hækkað 11% í mun til 1990.

**Útlátið frá fiskiskipunum** er hækkað úr 219 183 tonsum í 1990 til 244 998 tons í 2003 (12%). Frá 2001 til 2003 er útlátið hækkað við 8%.

**Útlátið frá húsarhaldum** er minkað úr 145 843 tonsum í 1990 til 120 625 tons í 2003 (17%). Frá 2001 til 2003 er útlátið minkað við 5%.

**Útlátið frá streymframleiðslu** er hækkað úr 89 750 tonsum til 114 708 tons í 2003 (28%). Frá 2001 til 2003 er útlátið minkað við 13%.

**Útlátið frá akførum** er hækkað úr 56 856 tonsum í 1990 til 79 603 tons í 2003 (40%). Frá 2001 til 2003 er útlátið hækkað við 8%.

**Útlátið frá ídnaðinum** er hækkað úr 62 162 tonsum í 1990 til 83 881 í 2003 (35%). Frá 2001 til 2003 er útlátið minkað við 1%. Minkingin er tí, at oljuleitingin í 2003 ikki nýtti so stóra nøgdir av olju sum í 2001. Um útlátið frá oljuleitingum ikki roknast uppí samlaða útlátið í 2001 og 2003, er útlátið frá ídnaðinum hækkað við 17% síðani 2001.

**Útlátið frá handlum og stovnum** er hækkað úr 39 185 tonsum í 1990 til 47 612 tons í 2003 (22%). Frá 2002 til 2003 er útlátið minkað við 7%.

Heilsufrøðiliga starvsstovan vil mæla til, at gjørd verður ein ítøkilig ætlan fyri, hvussu minkingar kunnu fremjast innan teir einstøku bólkarnar. Her kunnu ávísingarnar í veðurlagssáttmálanum og protokollini nýtast, sosum øktur orkueffektivitetur, íverksetan av skipanum, sum eggja til minking av útláti, og av skipanum, sum eggja til menning av varandi orkukeldum. Eisini kann tað verða av týdningi at nýta ymiskar avgjalds- og stuðulsskipanir, sum verða nýttar í okkara grannalondum, og sum vísa seg at vera virknar í mun til menning av tøkni og minking í útlátinum.

Orsakað av stóra útlátinum av vakstrarhúsgassi í seinastu øld fer veðurlagið væntandi at broytast meiri ella minni. Hetta uttan mun til, um tað eydnast pørtunum í Kyoto-protokollini at liva upp til málsetningarnar. Tí er tað eisini týdningarmikið at fáa staðfest, hvørjar ítøkiligar broytingar eru væntandi í Føroyum, og hvat eigur at verða gjørt fyri at tillaga seg til tær mest sannlíku avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum.

**Nýggja frágreiðingin: "Útlát av veðurlagsgassi í Føroyum. Dagføring fram til 2003" er tøk á www.hfs.fo, undir "Útgávur", m.a. saman við øðrum tilfari um veðurlagsgass.**




*Mynd 1. Útlátið av koltvíiltu býtt uppá bólkar 2003*

